## Føroyar áttu næststørsta tapið

Tað var tungt viðføri, sum føroyska landsliðsferðalagið hevur við sær tíðliga í gjáramorgunin, tá ið farið varð úr Vágum við kós ímóti Ukreina. 6-0 tapið er so mikið tungt og stórt, at tað sjálvandi er best, at tað verður lagt eftir í Føroyum. Føroyska tapið leygadagin var tað næststørsta í teimum 21 EM undankappingardystunum, sum vórðu spældir í dag. Størsta tapið legði San Marino rygg til á útivølli. San Marino vitjaði í Slovakia, og heimaliðið vann 7-0. Eisini har var støðan eftir 1. hálvleik 2-0. Meðan tvey mál vórðu skorað beinanvegin í Føroyum, so megnaði San Marino at halda tørn í 24 minuttir, áðrenn fyrsta málið varð skorað ímóti teimum. Í ongum av hinum 19 dystunum í dag var málmunurin størri enn trý mál.



## Mølvig venja Havnabátin

Kendi danski rógvarin Stephan Mølvig skal næsta ár rógva við Havnarbátinum. Hann skal eisini vegleiða øðrum manningum í felagnum, skrivar heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag. Tey, sum fylgja við altjóða rógving, kennast væl við Stephan Mølvig. Umframt at vinna danska meistaraheitið, so hevur hann vunnið olympisk gullheiðursmerki og nógvar altjóða kappingar. Í 2005 róður Stephan Mølvig við Nevinum Reyða hjá Klaksvíkar Róðrarfelag.

# i við buldur og brak



*Føroyska landsliðið varð yvirkoyrt av fronsku heimsstjørnunum á Tórsvølli leygardagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ikki minst hesin seinni nevndi arbeiddi so nógv og var so kringur, sum nakar spælari nakrantíð áður er sæddur at vera ímóti føroyska liðnum og á føroyskari grund.

Eftir steðgin vórðu blaðungu Lyon spælararnir Hatem Ben Arfa og Karim Benzema settir á vøllin. Tað var snilt av Raymond Domenech. 20 og 19 ára gomlu menninir vildu vísa venjaranum, at tað var dugur í teimum, og teir arbeiddu sum óðir, hóast tað langt síðani var greitt, at stigini skuldu ferðast av landinum saman við stjørnunum.

Móti føroysku spælarunum var hetta mest sum órættvíst. Teir høvdu í 1. hálvleiki runnið og tuskað aftaná stjørnunum sum hina ferð, tá ið skarðsmenn runnu eftir mánanum. Og so komu tveir púra hvíldir unglingar á vøllin og settu upp-aftur meiri ferð á! Tað kundi ikki annað enn endað heilt galið, og tað gjørdi tað.

### Amatørarnir

Føroyska liðið – ella rættari tað sum er eftir av tí – er í Ukreina og fyrireikar seg til enn eitt ódnartak, og spælararnir og venjarin vita væl, at avrikið leygardagin ímóti heimsstjørnunum ikki var tað, sum teir høvdu vónað.

Fyrr í ár hevur fótbóltsspælið verið væl betri, enn tað var í fjør. Uppleggið var aftur hesa ferð at spæla bólt - eisini á mótstøðuhálvuni. Tá ið bólturin viðhvørt var fingin frá stjørnunum, fluttu 4-5 hvítir seg fram um miðstrikuna, og Jón Rói, Christian Lamhauge og Símun Samuelsen iðra seg um, at góðu støðurnar hjá teimum ikki bóru mál við sær.

Men ofta var avleiðingin av framrættaða huginum eirindarleyst stjørnuhøgg í hinum endanum.

Størsta styrkin hjá føroysku amatørunum plagar at vera kollektivið og samhaldsfestið. Tað riggaði ikki hesa ferð. Spælararnir tóktust skeivt upp á bein og sinniliga illa trimmaðir.

Føroyingarnir vóru seinir, høvdu torført við at halda røttu støðurnar, høvdu ilt við at seta seg ígjøgnum og takla, og tað ber eisini til at siga, at teir ikki funnu hvønn annan so væl, sum teir onkra ferðina hava gjørt.

Fronsku stjørnurnar gloyptu amatørunum, og so var einki at gera. Tað var avgjørt ikki nóg gott, og tað kann gerast væl betri. Kanska kundi tapið havt verið eitt, tvey ella trý mál minni, um alt riggaði optimalt.

Men fyrst og fremst varð staðfest, hvussu stórur munurin er, tá ið stjørnur úr heimsins bestu feløgum, sum manna eitt av heimsins bestu landsliðum, tíma alla tíðina at arbeiða hart ímóti amatørum úr lítlu Føroyum. Eisini tá ið ferðin hevur verið long og lendingin stutt undan dystarbyrjan buldraslig. Stjørnurnar komu niður úr luftini og glampaðu alvorliga nógv í føroyska heystarveðrinum, har amatørarnir vórðu settir út á berajól.

## Føroyar-Frakland 0-6 (0-2)

EM undankappingardystur á Tórsvølli leygardagin 13. oktober 2007, kl. 16.00
**Dómarakvartett úr San Marino:** Gabriele Rossi, Massimo Zanotti, Massimo Mattei og Stefano Podeschi
**Dómaraeygleiðari úr Belgia:** Léon Schelings
0-1: Nicolas Anelka 6.
0-2: Thierry Henry 8.
0-3: Karim Benzema 50.
0-4: Jérôme Rothen 66.
0-5: Karim Benzema 81.
0-6: Hatem Ben Arfa 90.
1980 áskoðarar
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, liðformaður, 52/-119, B36, - 10. Christian Høgni Jacobsen, 37/2, NSÍ, 5. Jón Rói Jacobsen, 29/0, AaB, 7. Fróði Benjaminsen, 45/2, B36, 17. Einar Hansen, 1/0, NSÍ - 9. Símun Samuelsen, 13/1, Notodden (11. Andrew av Fløtum, HB, 27/1, 86.), 19. Súni Olsen, 30/1, AaB, 8. Mikkjal Thomassen, 8/0, B36 (2. Rókur av Fløtum Jespersen, 1/0, HB, 78.), 18. Hjalgrím Elttør, 14/0, NSÍ (3. Bergur Midjord, 1/0, B36, 46.) - 6. Rógvi Jacobsen, 46/9, HB - 14. Christian Lamhauge Holst, 8/0, Lyngby FC
**Á beinkinum uttazn at verða skiftir inn:** 16. René Tórgarð, 0/0, EB/Streymur, 15. Herbert í Lon Jacobsen, 0/0, B36, 13. Óli Hansen, 1/0, NSÍ, 12. Hans Pauli Samuelsen, 3/0, EB/Streymur
**Gult kort:** Súni Olsen
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**Frakland:** 1. Mickaël Landreau, PSG – 19. Bacary Sagna, Arsenal, 3. Eric Abidal, Barcelona, 15. Lilian Thuram, Barcelona, 2. Patrice Evra, Manchester United - 11. Jérôme Rothen, PSG, 6. Claude Makelele, Chelsea (21. Lassana Diarra, Arsenal, 73.) 8. Jérémy Toulalan, Lyon - 22. Franck Ribéry, Bayern München (14. Hatem Ben Arfa, Lyon, 64.) – 33. Nicolas Anelka, Bolton (9. Karim Benzema, Lyon, 46.), 12 Thierry Henry, Barcelona
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16 Sébastien Frey, Fiorentina, 4. Philippe Mexes, Roma, 5. William Gallas, Arsenal, 10. Sidney Govou, Lyon
**Venjari:** Raymond Domenech
**Gult kort:** eingin